# OBAMANIA



*Lagt til rættis: Rigmor Dam / Myndir: AP*



*Saman við indonesiska fosturpápanum, Lolo Soetoro, mammuni Ann Dunham og hálvsystrini, Maya í Jakarta, Indonesia*



*Barack Obama spældi kurvabólt í skúlanum. Her á einum liði frá 1976. Obama er fremst nummar fýra frá høgru*



*Við mammuni einaferð í 60'unum*



*Barack Obama saman kenyanska pápanum, sum eisini æt Barack Obama*



*Obama og abbin, Stanly Armor Dunham*

## FAKTA

Barack Hussein Obama
Føddur 4. august 1961 á Hawaii
Mamman er hvítur amerikanari og pápin úr Kenya
Løgfrøðingur frá Harvard University í Boston
Valdur í amerikanska senatið í 2004
Høvundi til bøkurnar Dreams from My Father og The Audacity of Hope
Er giftur og eigur tvey børn



*Barack Obama varð fyrsti litti stjórin á Harvard Law Review*

## Rasuskilnaður á einum vegamóti

**Viðhaldsfólk hjá Obama hava tikið hendan setningin til sín undir amerikanska valstríðnum: "Rosa sat so Martin could walk, Martin walked so Obama could run, Obama ran so our children can fly!"**

**Rosa** Parks (1913-2005) var svørt kvinna, sum varð handtikin í Montgomery, Alabama, í 1955, tí hon noktaði at lata einum hvítum manni sess sín í bussinum.

**Martin** Luther King, (1929-1968) var svartur baptistaprestur og borgararættidastríðsmaður, sum skipaði stórar kravgongur móti rasuskilnaði í USA. Hann varð skotin til deyða í 1968. Triði mánadagur í januar á hvørjum ári er frídagur í USA, til minnis um Martin Luther King.

**Barack** Obama (1961- ) er fyrsti litti amerikanski forsetin nakrantíð. Á amerikanskum máli verður runnið eftir ("run for") forsetasessinum.

# OBAMA-MENU

